# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Merkið í húnarhátt - harra løgmaður

»Alt ber til í politikki« - og »munur er á politikki og jura«. Hetta hevur løgmaður so ofta júkað. Tað er bara ein spurningur um at duga at samráða seg til røttu loysnina, sigur hann.

Hesa grundgeving hevur løgmaður so ofta nýtt, tá talað hevur verið um, hvussu ríkisrættarligu viðurskiftini kunnu bendast rætta vegin, uttan tó at Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum.

Júst hesa grundgeving átti løgmaður nú eisini at nýtt í sambandi við, hvørt sendistova Føroya í Íslandi skal flagga føroyskt ella danskt. Hetta hevur í roynd og veru einki við ríkisrættarligu tvístøðu okkara at gera, tí vit flagga øll føroyskt, alt frá konservativum sambandsfólki til víðgongd loysingarfólk.

Tað var so hugaligt at frætta, at íslendska sendistovan skal hava til húsa í søguligu Fútastovu í Havn, sum osar av søgu. Húsini hava hýst donskum embætisverki og frægum handilsvirkjum. Her var Nólsoyar Páll mangan á gátt hjá fútanum - eisini ta ferðina, hann jagstraði Brillumannin burtur. Seinni hevur V. U. Hammershaimb - sum bjargaði okkum málið - gingið inn á gólvið hjá abbanum og navnanum, Hammershaimb fúta, tí lítli Hammershaimb vaks upp hinumegin Gongina. Gamla kistan av kamfertræ er eisini úr umhvørvinum í Gongini, eins og Áarstovubrøðurnir báðir, ið á hvør sín hátt hava havt so stóran týdning fyri mentan og samleika okkara.

Jú víst eru kenslur uppií, tá vit tosa um flaggið. Illa var. Men at geva okkum undir Danabrók, bara tí at onkur í danska embætisverkinum sigur, at soleiðis má tað vera, tað eiga føroyingar ikki at gera - í øllum førum ikki í Íslandi!

So løgmaður hevur eitt at gera, tá sendistova okkara letur upp í Reykjavík, og tað er at vinda Merkið í húnarhátt. So kann Danabrók nýtast sum broðflagg á onkrari kommodu inni á skrivstovuni.

Danir eru valla so lítið at sær komnir, at teir fara at nokta okkum hetta - og hetta er í veruleikanum ikki eitt stríð um ríkisrættarstøðu okkara, tí hon er tað hon er - og harvið er flaggið okkara tjóðarmerki.

- Og harra løgmaður, tað er munur á politikki og jura. Og minst til, harra løgmaður, alt ber til í politikki - tað er bara at duga at samráða seg fram til røttu loysnina!

**Sosialurin**

# Vit eiga at leggja nýggjar stovnar og førleikakrevjandi arbeiðspláss út um landið

**JOHAN DAHL**
løgtingsmaður



Um vit skulu menna alt landið, sum eigur at vera endamálið hjá valdu umboðum á løgtingi, so er eisini neyðugt at vit tryggja, at tey førleikakrevjandi størvini verða sett á stovn kring landið og kanska í nógv størri mun á økjum, har vit vita, at afturgongd er í fólkatalinum, júst orsakað av at tær ungu familjurnar ikki koma heimaftur, tí førleikakrevjandi arbeiðspláss vænta í økinum haðani tey eru frá.

**Eitt** av hesum arbeiðsplássum er samgongan nú vorðin samd um at flyta til Suðuroyar, nevniliga Strandferðsluna, og tað meti eg vera skilagott, tí hvat er meira natúrligt enn at leggja umsitingina partvís umborð á Smyril og partvís í landið í Suðri.

Tey skip hjá SSL sum krevja mest umsiting eru Smyril og Teistin, og er ongin ivi um, at um ikki tey starvsfólk sum í dag manna stovnin eru áhugað at starvast í Suðri, so hava vit kvalifiserað fólk í økinum, sum kunnu taka uppgávurnar á seg.

Tað er sjálvandi umráðandi at hugsa rationelt í hesum sambandið og tí eigur eisini at verða miðað fram ímóti at leggja tær uppgávur, sum kunnu røkjast umborð á t.d. Smyrli, har, og ikki í landi.

Vit eiga at praktisera økismenningina í nógv størri mun. Hetta er so ein byrjan, og vóni eg at samgongan áhaldandi fer at menna tey øki í útjaðaranum, sum hava lív lagað, við at skapa karmar:

- fyri vinnuna so hon virkar eins væl í útjaðaranum og á meginøkinum
- við nýggjum stovnum og førleikakrevjandi størvum
- við fjølbroyttum útbúgvingarmøguleikum so unga fólkið ikki noyðist at flyta úr økinum.

Sum framhald av grein sum undirritaði fyri stuttum skrivaði um yvirupphitan og útjaðaran og

áhugaverdari greinarøð sum Jógvan við Keldu hevur havt um útjaðaran og onnur viðkomandi samfelagsviðurskifti, fara tingmenn at heita á løgmann um at leggja nógv størri orku í at kanna hvørji størv kunnu etablerast í útjaðaranum og hvørjir nýggir stovnar eiga at verða lagdir har, fyri at menna og stabiliserað økini.

# Trúgv og fakta

**JÚSTINUS EIDESGAARD**



Eg havi ta seinastu tíðina sæð í bløðunum greinarnar hjá Hans A. Sølvará og aftursvarini hjá Richard Danielsen um hvat er rætt og hvat ikki er rætt í bíbliuni.

Hetta hevur verið áhugavert, um einum dámar orðadrátt, og um einum dámar dramatikk í skriftstøðum, og kanska serliga um einum dámar stríð.

Eg skilji tó ikki, hví tað skal vera so neyðugt við vísindaligum prógvum fyri trúgv. Er talan um trúgv, um trúgvin skal prógvast?

Onkuntíð havi eg hug at siga, at eg trúgvi slett ikki upp á Jesu Kristus. Hann er eitt faktum í mínum lívi, sjónligur á øllum økjum, er sjálvur samanhangurin í mínum lívi, so her er slett ikki talan um trúgv, men reinan veruleika ella fulla vissu. Eg havi ikki tørv á eini vísindaligari prógvaðari halgubók fyri at trúgva. Og var haldabók vísundaliga prógvað øll sum hon var, so var heldur ikki neyðugt at trúgva.

Paulus tosar um vón og fulla vissu um tað sum ikki sæst í samband við trúgv.

Heimurin er ikki objektivur. Tað finnast eins nógvar útgávur av heiminum sum fólk eru á jørðini. Bíblian er heldur ikki objektiv. Hon er soleiðis sum tann einstaki lesir hana.

Eitt menniskja við tunglyndi, depressión, sær heimin gráan og sorgtungan. Um hetta sama menniskja ein dag fær heilsubót, antin gjøgnum sína trúgv ella hjálpt av læknum, so broytist hesin sami grái ella svarti heimurin og gerst ljósur og gleðiskendur. Hetta sama menniskja hevur nú uppliva tveir heimar, ein gráan og ein ljósan. Um halgabók varð lisin í tí gráa lívinum, hevði hon tikið seg ørvísi út, enn um hon varð lisin í tí ljósa livinum. Bíblian tekur seg eisini ymiskt út, um hon verður lisin við fáum lívsroyndum ella livaðum lívi, ella um hon verður lisin av einum við nógvum livaðum lívi.

Kanska eru hesar reglur eitt ískoyti til, at tað hevur ongan týdning í samband við trúgv á okkara trýeinda Gud, um skriftstøðini standa vísindaligt mát ella ikki.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.